# Jazzkonsertir í Havnar Klubba

**Tvær jazzkonsertir verða í næstum í Havnar Klubba har Katrina Petersen og Unn Patursson eru á odda fyri vælmannaðari trio**

JAZZUR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Fyrra konsertin verður nú fríggjakvøldið 15. desember. Katrina Petersen, sum er hálv føroysk/hálv donsk, fer at syngja jazz-standardar saman við Leivi Thomsen, guitar, Arnold Ludvig, kontra-bass og Rógvi á Rógvu spælir trummur. Kartina Petersen, sum er sanglærarinna í Tórshavnar Musikskúla, er ein frálík jazz-sangarinna og hevur ofta sungið jazz á Cleopatra til Jamm Session mikukvøld.

Hin seinna konsertin verður fríggjakvøldið 29. desember. Tá syngur Unn Patursson saman við hesi somu trio. Unn Patursson er millum annað kend frá kórinum Tarira, og hevur harumframt útgivið tvær fløgur. Tann fyrra, ”Gloymska við Greyp”, er ein soul-kend fløga. Hin seinna, ”RUN”, er meira jazz-kend. Unn Patursson fer at syngja løg av hesi fløguni, umframt nakrar jazz-standardar.

**Leivur Thomsen, Arnold Ludvig og Rógvi á Rógvu**

Hesir tríggir hava spælt saman í trio tað seinasta árið. Teir fara, umframt at spæla jazz-standardar, eisini at spæla egin instrumentalløg.


*Katrina Petersen*






Stórt úrval av leysamotorum.
Ring til okkara!




STUBBIN
Fjarðarvegur 12, 350 Vestmanna
Tlf. 471 800 / 218 540



**Mitsubishi Grand Pajero**

3,2 DI-D árg. 2001 til sølu um hóskandi boð fæst. MVG er í bilinum.

**Tel 233 740**